

*Nógvur goragangur hevur verið undan fíggjarlógarviðgerðini, og markeringarnar fingu eitt nú Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharrra, at biðja samgongulimir halda gák*

sær aftan fyri oyrað, at hann fær bert undirtøku fyri uppskotum, um tey eru viðgjørd og síðani góðtikin av øllum tinglimum. Er okkurt, ið tingfólk vilja hava broytt ella flutt, so skal tað vera møguligt. Hetta er tað, tey kalla politiskt handverk. Skal ryggdekningur fáast frá baklandinum, og skal undirtøka fáast frá tinglimum, so skal ávirkan latast afturfyri.«

## Annita upp í leikin

Í hesi innanhýsis orrustuni millum samgongulimir skuldi ikki verið neyðugt, at nøkur andstøða legði upp í leikin, men tað gjørdi Annita á Fríðriksmørk, ið var farin at troyttast av knarrinum hjá sambandsfólki um blokkniðurskurðin í 2001. Sambandsfólk skriva onki um fiskivinnupolitikk, segði hon. Onki um tær hundraðtals milliónir, ið kundu komið í landskassan. Onki um kommunureform. Onki um skúlareform. Onki um miðfyrisiting.

»At fáa nakað boð frá landsins leiðara um broytingar og betringar og gongdar leiðir hevur ongin nakrar vónir um, hvørki í samgonguni ella í andstøðuni. Hetta finna sambandsfólk seg eisini í. Bara tey sleppa at skriva um blokkniðurskurðin í 2001. Tey trútta niður í fólk, at rótin til alt ilt í Føroyum er blokkniðurskurðurin í 2001. Hetta siga tey, hóast inntøkurnar til landskassan frá skatti og avgjøldum eru øktar við eini milliard síðan 2001," skrivaði hon.

So við politisku skrivingini í vikuni sluppu lesararnir allan ringin runt.

> Jóannes Eidesgaard eigur at skriva sær aftan fyri oyrað, at hann fær bert undirtøku fyri uppskotum, um tey eru viðgjørd og síðani góðtikin
>
> *Edmund Joensen*

Samgongupolitikarar hildu hartingarfund fyri opnum leiktjøldum, og gamli spurningurin um Danmark sum bjarging í Føroyum ella ikki, kom eisini á breddan. Hvat lesararnir fingu burturúr annað enn endurtøkur av gomlum sjónarmiðum og ósemjum, er ilt at vita, men okkurt áhugavert kundi kortini lesast úr útmeldingunum, m.a. grundleggjandi hugsjónarligar ósemjur.

## Vinnugjøld og blokkur

Jóannes Eidesgaard boðaði í sínum lesarabrævi frá sparingum og tiltøkum, sum skulu tálma hallinum. Haraftrat arbeiðir hann sambært útvarpinum við, at eykagjøld skulu leggjast á alivinnuna, uppsjóarflotan og fjarfiskiflotan, so fleiri milliónir kunnu fáast í kassan. At júst hetta uppskotið hevur verið á veg, var kanska orsøkin til, at Bjarni Djurholm setti ferð á innanhýsis samgongukjakið við síni kronikk. Hann vísti nevniliga á, at ongin politiskur vilji er til at laga almennu útreiðslurnar til fíggjarstøðuna. Í staðin verður bara tosað um at leggja gjøld á vinnuna.

»Hvør torir at reformera sjúkrahúsøkið, niðurleggja skúlar, skerja lestrarstudningar, tálma almannaøkið, fremja lønarafturhald, leggja stovnar saman o.s.fr.? Nei, tá er ólíka lættari at vilja økja inntøkurnar hjá landskassanum, at tosa um at breiðka skattagrundarlagið, hækka avgjøld, fremja ognarskatt, leggja fleiri gjøld á vinnuna, ja, bara fantasiurin setir mørkini. Búskapurin sleppur ikki at tillaga seg. Úrslitið verður, at vit flyta okkum frá málinum um livandi og sjálvberandi búskap inn í stagnatiónina og afturgongdina,« skrivaði hann.

Og meðan spenningurin undan fíggjarlógarviðgerðini økist, eru ikki bara samgongulimir vorðnir pennaóvinir, men eisini Annita á Fríðriksmørk og Helgi Abrahamsen, fremsti framsøgumaður hjá Sambandsflokkinum í blokkstuðulsmálum. Annita á Fríðsriksmørk skrivaði, at blokkurin av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni er sum ein pirra, einans 5 prosent. Ja, so rímiligt, svaraði Helgi Abrahamsen, hví skuldi fullveldislandsstýrið so brúka 15 ár um at fáa hesa pirruna burtur.

Soleiðis trætast tey, áðrenn fíggjarlógarviðgerðin er byrjað. Nýggir tónar eru ongir at hoyra, bara gamlir, og tvinnir eru kostirnir hjá teimum, ið lesa, annaðhvørt at taka alt í álvara ella lata seg undirhalda av, at politiski retorikkurin melur í ring við somu ósemjum og uppáhaldum sum áður. Ið hvussu er tykist vist, at ringt verður hjá fíggjarmálaráðharranum at geva sínum politisku starvsfeløgum kjaftband.